# Havstovan søkir eftir **kokki**




## Søkt verður eftir kokki til Jákup Sverra at byrja skjótast gjørligt.

**Lýsing av Jákup Sverra**
R/S Jákup Sverri
Tórshavn

Skipaslag: Havrannsóknarskip

Manningin telur millum 8 og 13 mans, alt eftir slag av túri. Harumframt eru altíð starvsfólk frá Havstovuni við umborð á kanningarferðunum.

Starvið fevnir um matgerð, proviantering, reingerð v.m.

Vit leita eftir kokki, sum tilvitað og við nærlagni kennir týdningin av heilsugóðum og varieraðum máltíðum, og á henda hátt ger sítt til at tryggja trivnaðin umborð. Tað verður væntað, at tú viðvirkar til at skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi við tínum blíðskapi og góðu samstarvsevnum.

### Setanartreytir

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Sjóvinnubræv sum kokkur krevst.

### Umsóknir

Skrivligar umsóknir við CV, avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 7. juni 2022.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Havstovan**
**Nóatún 1**
**P.O. Box 3051**
**FO-110 Tórshavn**

**ella teldupost: starv@hav.fo**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Erling í Liða, reiðara, á tlf. 79 39 01 ella teldupost: erlingl@hav.fo

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo